Álit

í

løgtingsmáli nr. 15/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin) (Árlig javning av landsskattastiganum)

Árni Skaale, Bárður á Lakjuni, Beinir Johannesen, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, Jacob Vestergaard og Jørgen Niclasen, tingfólk, hava vegna Fólkaflokkin lagt málið fram 21. september 2023, og eftir 1. viðgerð 17. oktober 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 26. oktober og 9. november 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, saman við TAKS.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Eirikur í Jákupsstovu og Hanna Jensen) er samdur við uppskotssetararnar um, at stóri prís- og lønarvøksturin í Føroyum seinastu árini, har landsskattstigin hevur verið óbroyttur síðani 2016, hevur elvt til, at størri partur av lønini so líðandi er lyftur upp á hægri skattastig, og at borgarar tí eru vorðnir skattaðir alsamt harðari.

Meirilutin heldur eisini, at tað kann vera skilagott at arbeiða við eini árligari javning av skattastiganum, sum er kjarnin í hesum lógaruppskotinum, og uppskotið leggur fram ein hátt at skipa javning, stig og vøkstur, sum er áhugaverdur. Ein av veikleikunum í uppskotinum er tó, at víst verður ikki til, hvussu útreiðslurnar til javningina skulu fíggjast.

Í sambandi við skattaumlegging, sum landsstýriskvinnan í fíggjarmálum fyri stuttum hevur lagt fyri tingið, og sum er til viðgerðar í nevndini í løtuni, verður ein skattalætti nú givin lág- og miðalløntum í tveimum stigum, í 2024 og 2025, og grundgevingarnar eru m.a. at minka inntøkuskattin, so at tað skal loysa seg betur at arbeiða fulla tíð.

Við tí uppskotinum verður skattastigin javnaður, eins og skattatrýstið á lág-og miðalinntøkur verður lækkað. Skattalættin verður latin soleiðis, at stóra fjøldin av lág- og miðalløntum rindar lægri skatt av síðst vunnu krónuni. Við hesum fer betur at loysa seg at arbeiða fulla tíð. Ítøkiliga verða 100 mió. kr. latnar í skattalætta í 2024 og 100 mió. kr. í 2025. Harumframt eru nøkur fylgilógaruppskot, sum skulu tryggja fíggingina av hesi javning av skattastiganum yvir tvey ár.

Ein av ætlanunum hjá landsstýriskvinnuni er júst eisini at arbeiða við einum leisti, har skattastigi og avgjøld verða javnað regluliga, men av tí at skattaumleggingin verður framd í 2024 og 2025, verður arbeitt við at fáa árligu javningina inn frá 2026.

Av tí at landsstýrið arbeiðir við málinum at javna skattastigan regluliga, tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Beinir Johannesen, Magnus Rasmussen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:
Endamálið við uppskotinum er at javna mørkini í skattastiganum á hvørjum ári. Uppskotið leggur upp til, at landsstýrisfólkið skal leggja fram uppskot til løgtingslóg um javning av skattastiganum fyri komandi ár áðrenn 8. mars á hvørjum ári, fyrstu ferð í 2024. Uppskotið um javning skal sostatt leggjast fram tíðliga á árinum, og hevur hetta til endamáls, at løntakarar í góðari tíð frammanundan kenna skattligu fortreytirnar fyri komandi árið. Skipanin fær sostatt virknað fyri skattaárið 2025 og frameftir.

Mett verður tó eisini neyðugt fyri komandi ár at javna skattastigan. Tí verður í lógaruppskotinum ásett, at skattastigin fyri 2024 verður javnaður við 4%.

Í takt við, at tað hevur verið búskaparlig framgongd, eru lønirnar vaksnar. Tó hevur landsskattastigin ikki verið broyttur síðan 2016.

Tað hevur merkt, at størri partur av lønini so líðandi er lyftur upp á hægri skattastig, og at borgarar tí eru vorðnir skattaðir alsamt harðari. Serliga merkist tað hjá fleiri lág- og miðalløntum, at stigin ikki verður javnaður í samsvari við lønarvøksturin.

Uppskotið leggur upp til, at mørkini í skattastiganum verða javnað á hvørjum ári, so hann fylgir lønarvøkstrinum, og á tann hátt verður byrgt fyri, at skattatrýstið fer at vaksa av sær sjálvum, sum tað hevur gjørt undanfarnu árini, so leingi politiska skipanin letur standa til.

Minnilutin heldur, at tað er rætt at byrgja fyri, at skattatrýstið veksur av sær sjálvum, so at ikki vaksandi skattlig byrða verður løgd á borgaran.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 23. november 2023

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	